**LEIÐSLUFRÁGREIÐING**

## Virksemi

Vinnuframi varð settur á stovn sambært løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um vinnuframa grunn. Enda málið við Vinnuframa er, at hann skal stuðla vinnuni í avmarkaðan mun – uttan at veita rakstrar- og íløgustuðul. Grunnurin stuðlar tiltøkum, sum fjøltátta vinnulívið og økja um nýtsluna av vitan.

Kunngerð um virksemi og umsiting hjá Vinnuframa varð lýst 29. november 2001, har landsstýrismaðurin í vinnumálum – samsvarandi vinnupolitikki Landsstýrisins – staðfestir tey vinnu greina øki, sum serligur dentur skal leggjast á at stuðla.

Umframt omanfyri nevnda virksemi umsitur Vinnuframi eisini stuðulsskipan til skipasmíð og ymsar uppgávur fyri Vinnumálaráðið.

## Árið 2011

Stýrið fyri Vinnuframa hevur lagt dent á at stuðla marknaðarføring og sølufremjan í 2011.

Eins og undanfarna ár verður raksturin støðugt rationaliseraður, soleiðis at skilja, at umsitingin átekur sær fleiri ráðgevingaruppgávur, ið áður vórðu røktar av uttanhýsis ráðgevum. Við hesum leisti metir stýrið, at stuðulin verður betri gagnnýttur til mennandi verkætlanir samfelagnum at frama. Nýggja skipanin, har ið samskipari grunnsins er eitt bindilið ímillum stýrið og umsøkjaran, virkar til, at umsøkjarin fær skjótari viðgerð og eisini røttu ráðgeving fyri møguleikarnar við tí góða hugskotinum.

Vinnuframi fekk nýtt navn í árinum, eins og heimasíðan varð tillagað og dagførd. Stýrið metir, at nýggja navni er meira tíðarhóskandi og er eitt tekin um ein meira dynamiskan grunn, har ið fokus verður lagt á at stuðla tí góða hugskotinum.

Rentuinntøkurnar vóru 1.302 tkr. í 2011 mun til 1.652 tkr í 2010.

Vinnuframi hevur í 2011 viðgjørt 62 umsóknir, harav 35 umsóknir vórðu játtaðar. Í stuðli vórðu veittar 2.686 tkr. brutto, meðan 886 tkr. vórðu afturførdar.

Eginognin við árslok var 34.584 tkr., herav er stovnsfæið 29.601 tkr. Orsøkin til broytingina í stovnsfænum er hon, at løgtingið í mai 2011 játtaði 10 mió.kr. av stovnsfænum til innrætting av Granskarasetri.

Við árslok 2011 er tøki peningurin 36.374 tkr., meðan játtaður ikki útgoldin stuðul er 3.206 tkr.

## Stuðul latin og/ella játtaður í 2011

Í 2011 hevur Vinnuframi m.a. játtað/útgoldið stuðul til hesar verkætlanir:

**LEIÐSLUFRÁGREIÐING**

**Faroe Maritime Technic**
*Umsøkjari:*
Faroe Maritime Technic við Kaj Joensen. Sludge Dewatering Separator.

Lýsing:
Faroe Maritime Technic varð sett á stovn í 2009 til tess at víðarimenna ein oljuskiljara, ið kundi reinsa kjalarvatn í skipum. Oljuskiljarin er mentur av Faroe Maritime Technic við Kaj Joensen. Kaj er útlærdur maskinsmiður og maskinistur. Hann hevur áralangar royndir sum chiefur á grønlendskum rækjutrolarum.

Faroe Maritime Technic er fyritøka í Vági og arbeiðir við nýskapan og vørumenning.

*Stuðul:*
Vinnuframi játtaði í november 2011 stuðul til menning av prototypu.

*Endamál:*
Endamálið er at menna ein vatnskiljara, ið skal nýtast til at skilja vatn frá sludge á skipum. Sludge er tað, sum kemur úr sentrifugum og tilíkum. Tað skal pumpast í land, og tess meiri vatn er í, tess kostnaðarmiklari er tað fyri reiðaríið. Við nýggja Sludge Dewatering Separator skulu eisini emulgeringar kunna skiljast frá so effektivt, at vatnið kann útleiðast, og oljan kann pumpast í land, frí fyri vatn. Hetta hevur við sær munandi fíggjarligar- og tíðarsparingar hjá reiðaríum. Júst hetta er ein orsøk til, at Maersk Supply og Faroe Maritime Technic eru felags um verkætlanina, eitt sokallað joint-venture samstarv, har Mærsk eisini gerst umhvørvisvinaligari. Skipanin skal royndarkoyrast á einum av supply-skipunum hjá Mærsk.

*Úrslit:*
Verkætlanin er sprottin úr teimum góðu royndum, sum Mærsk hevur við oljuskiljaranum til bilge-vatn frá Faroe Maritime Technic.

Endamálið nú er at gera eina heildarloysn fyri alt oljudálkað vatn umborð, so at vatnið kann reinsast og pumpast á sjógv uttan kostnað, og spilloljan kann savnast í tangar og pumpast í land.

Fyri Faroe Maritime Technic hevur henda verkætlan alstóran týdning. Eydnast verkætlanin sum ætlað, fer tað at kunna verða gjøgnumbrotið hjá fyritøkuni. Ikki bert verður tað prógv um, at hugskotið virkar í verki, og at kundin fær eina loysn, sum sparir honum tíð og pening, men Faroe Maritime Technic fær eisini ein stóran kunda í Maersk Supply, sum fer at tryggja fyritøkunum økonomiskt grundarlag. Góðu royndirnar hjá einum altjóða viðurkendum reiðarii fara eisini at gera tað lættari hjá Faroe Maritime Technic at marknaðarføra oljuskiljaran í altjóða høpi.

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

*Stuðulsskipanir, ið søkt varð ígjøgnum:*
Faroe Maritime Technic søkti um stuðul ígjøgnum tvær av stuðulsskipanunum hjá Vinnuframa. Vørumenning og Cleantech.

Endamálið við Vørumenning er at stuðla menning av nýggjum vørum og víðarimenning av verandi vørum, heruppií at lata studning til menning av nýggjum framleiðslutólum og framleiðsluháttum. Vørur fevna í hesum samanhangi eisini um tænastur.

Endamálið við Cleantech er at stuðla framleiðslu, menning og nýtslu av nýskapandi cleantech-loysnum, serliga á skipum. Stuðulin kann eisini veitast til menning av nýggum framleiðslutólum og framleiðsluháttum. Cleantech-loysnir eru loysnir, sum verja umhvørvið og eru orkusparandi.

**Studio Bloch**
*Umsøkjari:*
Studio Bloch við Jónasi Bloch Danielsen. Ljóðstudio til upptøku og ljóðblandan av tónleiki o.ø.

*Lýsing:*
Jónas Bloch Danielsen er útbúgvin ljóðteknikari og framleiðari. Hann hevur drúgvar royndir í Føroyum og uttanlands og hevur tikið upp uml. 70 útgávur. Harumframt hevur Jónas ljóðblandað til konsertir o.a. kring allan heim.

Fyri at fullgera sínar studiomøguleikar søkti hann um ráðgeving til at útvega kapital og til at fáa gongd á handilsliga raksturin av studio sínum.

Harumframt tørvaði honum fígging og søkti tí um ráðgeving til at útvega fígging, finna íleggjarar o.a.

*Stuðul:*
Vinnuframi játtaði í februar 2011 at stuðla Jónasi Bloch Danielsen til ráðgeving í sambandi við hækkan av kapitali.

*Endamál:*
Studio Bloch er eitt ljóðstudio, ið ger ljóðframleiðslur av øllum slagi. Kjarnuhugskotið er at skapa eitt hágóðskuljóðstudio, ið vendir sær til heimlig og útlendsk listafólk. Umframt fyrsta floks fakligan førleika er eisini neyðugt at hava góðar karmar og útgerð, um hetta skal vera gjørligt.

Hartil er neyðugt at hava ein góðan lista at vísa á, t.e. ein lista yvir kendar tónleikarar og framleiðarar, ið hava tikið upp í Studio Bloch, og sum viðmæla øðrum at gera tað sama. Soleiðis fer tað við tíðini gerast eitt viðurkent studio, sum lokkar fleiri og fleiri tónleikarar og bólkar til landið.

**LEIÐSLUFRÁGREIÐING**

Hetta gagnar ikki bert Studio Bloch, men eisini tónleikaumhvørvinum í Føroyum sum heild.

*Úrslit:*
Fyri Studio Bloch hevði tað altavgerandi týdning at fáa fígging, um málini skuldu røkkast. Grundarlagið var, at royndirnar høvdu prógvað sítt virði, og at tíðin var komin til at styrkja um plattformin fyri at koma longri út. Við styrkta kapitalgrundarlagnum bar til at fremja avgerandi íløgur í útgerð og í sjálvt studio. Júst hesar íløgur eru við til skapa ta dygd, sum marknaðurin vil hava, og sum fakligi stoltleikin hjá Jónasi krevur.

Studio Bloch kann í dag, desember 2011, longu vísa á hópin av dygdargóðum upptøkum. Millum teirra, sum hava tikið upp í Studio Bloch, eru Mezzoforte, Eivør, Teitur, 200, Aldubáran og Hanus G. Johansen fyri at nevna nøkur.

*Stuðulsskipanir, ið søkt varð ígjøgnum:*
Jónas Bloch Danielsen søkti stuðul ígjøgnum tvær av stuðulsskipanunum hjá Vinnuframa. Íverksetarastuðul áðrenn byrjan og Stuðul til víðkan av kapitalgrundarlagi.

Endamálið við hesum báðum stuðulsskipanum er í fyrra lagi at stuðla íverksetarum við at stovna egið virki, og í øðrum lagi at geva virkjum, sum eru yngri enn 3 ár, møguleikan at søkja um ráðgeving í sambandi víðkan av kapitalgrundarlagi.

Í ráðgevarabankanum hjá Vinnuframa er hópur av dugnaligum fólki, ið kunna ráðgeva um íverksetaravirksemi. Endamálið við ráðgevarabankanum er at bjóða íverksetarum dygdargóða ráðgeving á ymiskum fakøkjum.

**Your Song**
*Umsøkjari:*
YourSong Production við Jákupi Zachariassen. Hittfactory.

*Lýsing:*
YourSong er ein tónlistarlig hittfabrikk. Hugskotið er fáa ferð á eina nýggja vinnu í Føroyum við at gagnnýta stóra tónatalentið í landinum og við at skapa eitt joint-venture samstarv við altjóða artistar og útgávufeløg. YourSong skal vera

1) bindilið millum kreativar komponistar og yrkjarar og millum okkara fremstu tónleikaframleiðarar og 2) geva atgongd til altjóða tónleikamarknaðin. Málið er at skapa og selja føroyskan tónleik altjóða.

2) Endamálið við YourSong er sostatt ikki bert ein felags marknaðarføring, men ein áhaldandi framleiðsla av føroyskum tónleiki, sum við føroyskum og altjóðaartistum verður seld í joint-venture samstarvi við altjóða útgávufeløg.

*Stuðul:*
Vinnuframi játtaði í desember 2009 at stuðla verkætlanini Hittfactory hjá YourSong.

*Endamál:*
Henda fyrsta stóra verkætlanin hjá YourSong er eitt ítøkiligt samstarv við fleirfalda Grammy-vinnaran,

Russ Taff, og altjóða útgávufelagið, Gaither Music, um at gera eina nýggja fløgu við føroysk framleiddum tónleiki, har Russ Taff er sangari og Gaither Music er útgevari í USA. Tá YourSong við fyrstu verkætlanini saman við Russ Taff er farið at virka sum konsept, er ætlanin at samstarva um kommersiellar verkætlanir við aðrar altjóða og føroyskar artistar.

Mett verður, at júst eitt slíkt samstarv fer at gera tað møguligt fyri fyrstu ferð at skapa eitt kommersielt gjøgnumbrot fyri føroyska tónleikavinnu altjóða.

*Úrslit:*
Eftir at verkætlanin hevði fingið stuðul, varð farið í gongd. Verkætlanin kann sigast at hava eydnast avbera væl, og fyrsta beinleiðis úrslitið er fløgan Faroe Islands hjá Russ Taff. Fyri YourSong hevur henda succes'in stóran týdning. Verkætlanin vil virka sum bench-mark fyri aðrar líknandi verkætlanir, og konseptið kann víðarimennast.

Á Vinnudegnum í september 2011 vann verkætlanin heiðurin Ársins átak 2011. Grundgevingin var millum annað: "Við hesi fløguni hevur føroysk tónleikaframleiðsla við Jákupi Zachariassen á odda víst, at tað ber til at fáa altjóða tónleikarar henda vegin at spæla inn, og dómsnevndin heldur, at tað er eitt átak, sum lýkur treytirnar fyri at verða ársins átak."

*Stuðulsskipanir, ið søkt varð ígjøgnum:*
YourSong søkti stuðul ígjøgnum stuðulsskipanina Rútmiskur tónleikur. (Stuðulsskipan fevnir í dag um annað og meira enn rútmiskan tónleik og verður nevnd Kreativ vinna).

Endamáið við stuðulsskipanini er at stuðla kreativum vinnum, sum hava møguleika at røkka útlendskum marknaðum, og sum hava ítøkiligan møguleika at geva avkast innan rímiliga tíð.

Stuðul verður veittur til tey átøk, sum fíggjarliga og fyriskipanarliga eru meira krevjandi, og sum umboða eina ítøkiliga stremban eftir at gera listafólkið/listina kenda og eftirspurda. Stuðul verður ikki veittur til einstakar framførslur/framsýningar og ferðir.

**Guðrun & Guðrun**
*Umsøkjari:*
Guðrun & Guðrun, messa í Tranoi, Paris, oktober 2011.

*Lýsing:*
Guðrun & Guðrun er sniðfyritøka, sum Guðrun Ludvig og Guðrun Rógvadóttir byrjaðu fyri 11 árum síðan. Í fyrstani var bert arbeitt við skinnvørum og bert í Føroyum. Í februar 2002 var fyritøkan á mótamessu í Keypmannahavn fyri fyrstu ferð. Áhugin var stórur, men størsta ansin vunnu hondbundnu klæðini, sum bert vóru tikin við fyri at fylla eitt sindur upp. Síðan hevur fokus verið á hondbundnum. Tað hevur gingið framá, og fyritøkan hevur skapt sær eitt mótanavn. Tó er langt á mál, og mótamessur hava avgerandi týdning fyri framtíðina hjá fyritøkuni. Messur hava ymiskan týdning frá vinnu til vinnu. Í mótaheiminum verður m.a. hugt eftir, um veitarin er støðugur og er á marknaðinum árið eftir, tí keyparin vil kunna geva kundum sínum eitt trygt og gott úrval. Til at vinna hetta álit má Guðrun & Guðrun luttaka á somu messum ár um ár. Fyritøkan hevur luttikið í Tranoi áður – við góðum úrsliti – og málið hesa ferð er at styrkja jaligu gongdina og fáa fleiri fastar kundar.

**LEIÐSLUFRÁGREIÐING**

*Stuðul:*
Vinnuframi játtaði í august 2011 at stuðla Guðrun & Guðrun.

*Endamál:*
Fyri fyritøkur sum Guðrun og Guðrun hevur tað vitalan týdning at koma út og vísa sínar vørur fyri møguligum stórkeyparum. Tí er marknaðarføring ígjøgnum vørumessur ein týðandi liður.

Kreppan hevur tó havt við sær, at fleiri keyparar einans vitja eina messu árliga, so umráðandi er at velja ta messuna, har flest møguligir verandi og nýggir kundar koma. Fyri Guðrun og Guðrun er messan í Tranoi í Paris rætta valið, tí hon er týdningarmesta mótamessa í heiminum, og tað er her, at størsti parturin av málbólkinum hjá Guðrun & Guðrun luttekur. Tranoi er eitt nú messan, sum japanskir innkeyparar raðfesta fremst.

Endamálið við messuluttøkuni er at finna nýggjar kundar og at tæna verandi kundum.

*Úrslit:*
Enn ber ikki til at staðfesta endaliga úrslitið. Ítøkiligar samráðingar eru við Isetan og United Arrows (department stores) úr Japan og Asos (webstore) um vetrarkollektiónina. Aðrir kundar, sum høvdu sæð kollektiónina í Milano, komu við endaligari bílegging í Tranoi.

*Stuðulsskipanir, ið søkt varð ígjøgnum:*
Guðrun & Guðrun søkti um stuðul ígjøgnum stuðulsskipanina Vørumessur. Endamálið við skipanini er at stuðla føroyskar luttøku á vørumessum og framsýningum uttanlands. Eitt nú fyritøkum, sum vilja styrkja støðu sína á útlendska marknaðinum, og fyritøkum, feløgum og stovnum, ið skipa fyri framsýningarluttøku uttanlands.

## Framtíðin

Stýrið fyri Vinnuframa fer í 2012, at leggja dent á, at játta stuðul til marknaðarføring, sølufremjandi tiltøk, kreativar vinnur og ferðavinnutænastur. Vinnuframi arbeiðir støðugt við at gerast meira sjónligur og brúkaravinaligur í 2012.

Afturat høvuðsvirkseminum, sum er at stuðla tí góða hugskotinum, átekur Vinnuframi uppgávur frá Vinnumálaráðnum, m.a. umsiting av Invest.fo og virkar sum myndugleikaumboð í norðurlendskum samstarvi innan kreativar vinnur.

Vinnuframi byrjaði í 2010 arbeiði uppá at seta eitt Granskarasetur á stovn í Føroyum til tess at seta ferð á íverksetan av nýggjum granskingarvirksemi og menning av verandi virksemi í Føroyum.

Grunnurin hevur tikið 10 milliónir av stovnsfænum til innrætting av Granskarasetrinum. Slík Granskarasetur hava virkað í mong ár í flestøllum framkomnum londum við samstarvi millum granskingarstovnar, fróðskaparsetur, vinnulív, almennar stovnar og politisku skipanina.

Í 2011 bleiv felagið iNOVA sett á stovn, ið hevur til endamáls at reka Granskarasetrið og byggja upp eitt felags granskingar- og menningarumhvørvi. Endamálið er at fáa fyritøkur og almennar stovnar at leggja granskingar og menningarvirksemi í Granskarasetrið, og at keypa tól í felag fyri á tann hátt saman at virka fyri eini felags tóllund í Føroyum.

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

Sáttmáli við arbeiðstakarar varð undirskrivaður í mai 2012, og væntandi verða hølini tøk at innrætta við nýmótans starvsstovum, tólum, skrivstovum og fundarhølum í 2012. Raksturin av Granskarasetrinum verður handaður iNOVA í oktobur 2012, tá arbeiðið væntandi er liðugt.

Vinnuframi fegnast um at tilgongdin og undirtøkan hevur verið so stór. Vónandi verður hettar eitt stórt framstig fyri granskingar- og menningarumhvørvi í Føroyum.

### Hagtøl

Játtaði stuðulin hjá grunninum hevur háttað seg soleiðis seinastu seks árini (í túsund krónum):




| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnuframaátøk | 2.200 | 1.850 | 2.700 | 1.800 | 667 | 258 | 9.475 |
| Menning | 2.747 | 2.635 | 1.953 | 1.341 | 719 | 885 | 10.80 |
| Marknaðarføring | 1.734 | 2.262 | 1.501 | 2.563 | 2.057 | 1.109 | 11.227 |
| Aðrar | 90 | 32 | 504 | 215 | 337 | 434 | 1.611 |
| | **6.771** | **6.779** | **6.660** | **5.919** | **3.780** | **2.686** | **32.593** |

## LEIÐSLUFRÁGREIÐING

Samlað fyri árini 2006-2011 hevur býtið verið soleiðis millum ymisku sløgini av stuðli:

